## Føroya Fólkaháskúli heiðraður á fólkafundi



2. hvítusunnudag kl. 15.00 verður fólkafundur í Føgrulíð, nú tað í ár eru 110 ár síðani Háskúlin byrjaði virkið sít har. Fundurin verður í Føgrulíð á Borðoynni, á grundini har sum skúlin stóð frá 1900 til 1909.

Á fundinum verða: Røður, felagssangur og sangur.

Røðarar verða : Turið Sigurðardóttir, Hermann Oskarsson og Sólfinn Hansen.

Sangur: Hanus G. Jóhansen og Jógvan Andreas Joensen.

Sangbløð til felagssangin verða býtt út.

Fyri at eingin ferðsluproppur skal verða, verður busskoyring frá sandinum og niðan á Háls, so tey, sum ikki ynskja at ganga tann teinin, kunnu verða koyrt niðan.

Bussurin byrjar at koyra kl. 13.00.

Bilførarar verða vinarliga bidnir um at seta bilin niðri í býnum.

**Rd.**



# Frændur og Brandur á Jóansøkufestivalinum

Frændur og Brandur Enni eru nýggju nøvnini, sum Jóansøkufestivalurin nú avdúkar. Frændur eru fólkaogn, og Brandur kemur í heyst við nýggjari fløgu, har hann samstarvar við fleiri spennandi tónleikarar sigur Jóansøkufestivalurin í tíðindaskrivi.

Jóansøkufestivalurin í ár er skipaður sum stuðulstiltak til frama fyri at gera saltsiloina á Drelnesi til mentanarhús, og eru tað føroyskir tónleikarar, ið fegnir stuðla ætlanini, ið eru á skránni hjá Jóansøkufestivalinum 2009. Tvey nøvn afturat verða nú avdúkað, og eru tey Frændur og Brandur Enni.

**Rd.**

# Jeremy Camp á Fjarðafestivalin

Fjarðafestivalurin veit at siga, at høvuðsnavnið, Jeremy Camp, kemur til Føroya fríggjadagin í næstu viku við leigaðumflogfari. Fyrireikarirnir av fjarðafestivalinum hava gjørt avtalu við enskt útleigufelag um leiguflogfar, sum skal flúgva Jeremy Camp og manning um Norður Atlantshavið, úr Edinburg til Føroya.

Jeremy Camp er kosin ársins artistur og sangskrivari av størsta kristna tónleika magasininum í USA, CCM magasin. Hann trínur á pall í Skálabotni fríggjakvøldið 5 mai.




Grundstykkir í nýskapandi útstykkingini »Býlingur við túnum« í Hoyvík verða hervið lýst í almenna sølu

## Kundi tú hugsað tær eitt grundstykki í Hoyvík?







Talan er um útstykking, ið verður staðsett eystan fyri Karlamagnusarbreyt, millum Hoyvíkar skúla og Myllutjørn.

Stykkini verða 300 m², harav 100 m² verða partar av felagsøki. Á stykkjunum kunnu byggjast hús, ið eru umleið 55 m² og í mesta lagi 3 fullar hæddir, ella samanlagt 165 m². Somuleiðis kann byggjast úthús/-bilhús á umleið 20 m².

Fleiri upplýsingar eru at finna undir »Stutt kunning« á www.torshavn.fo

**Kostnaður**
Stykkini eru mett at kosta kr. 495.000.

Við í kostnaðinum er planering av stykkjunum, vegarbeiði og leggjan av leiðingum til vatn, streym, telefon og gøtuljós, umframt at felagsøkini verða gjørd liðug.

**Freist**
Áhugaðir keyparar skulu boða kommununi frá í seinasta lagi 15. juni 2009 við at senda eini skrivlig boð, umframt váttan frá peningastovni um tøka fígging til:

**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32
110 Tórshavn
Faks 30 20 10
e-postur torshavn@torshavn.fo

Grundstykkini verða tillutað eftir lutakasti millum møguligar keyparar.

**Fleiri upplýsingar**
Eru spurningar ber til at venda sær til Snarskivuna á 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**